# ítróttur

Nr. 62 • týsdagur • 28. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# HB endaði á Mølini

**Lagt er upp til fleiri tættar og spennandi fjórðingsfinalur í kappingini um Løgmanssteypið. HB fekk truplan dyst á Eiði, meistarnir skulu til Toftir, og kommunuuppgerð verður millum Skála og NSÍ**


FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*

*eydun@sosialurin.fo*


Mánakvøldið var lutakast til fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið. Bara lið í fremstu deildini eru eftir í kappingini, og tí var stórur spenningur um, hvussu tey fremstu liðini vórðu parað í hesum týðandi dysti.

Úrslitið gjørdist fýra góðar og tættar fjórðingsfinalur, har tað tykist vera rættiliga opið í øllum dystunum.

Meistararnir úr B36 mugu metast sum favorittar til sína fjórðingsfinalu, sum verður ímóti uppflytarunum úr B68. Dysturin verður á Toftum, og har hevur B36 ikki altíð havt tað lætt. Munur eigur tó at vera millum meistarar og uppflytarar.




*Jákup á Borg og liðfelagarnir í HB skulu spæla á útivølli ímóti EB/Streymi í fjórðingsfinaluni í steypakappingini*

### HB til Eiðis

Hitt stóra havnaliðið fekk eina trupla uppgávu í fjórðingsfinaluni. HB skal til Eiðis at spæla ímóti EB/Streymi, sum hevur eitt sterkt lið, ið kann koppa teimum størstu á heimavølli.

HB hevur áður havt truplar dystir á Mølini, og í fjør var tapið á Eiði dropin, sum fekk bikarið at flóta yvir, og venjarin hjá HB varð koyrdur.

Á Skála fara tvey bæði fremstu fótbóltsfeløgini í Eysturoynni seinastu tvey árini, NSÍ og Skála, at dystast í eini lokalari fjórðingsfinalu. Skála og Runavík eru í somu kommunu, men kappingini millum feløgini hvør sínu megin Skálafjørðin er grót-hørð.

Fjórða fjórðingsfinalan verður í Klaksvík, har KÍ og GÍ fara at spæla. Hesi bæði liðini høvdu ein vánaliga landskapping í fjør, men GÍ gjørdi tað bragd at vinna steypakappingina. Steypavinnararnir úr Gøtu komu trygt í fjórðingsfinaluna, men uppgávan í fjórðingsfinaluni verður heldur strævnari enn í seinasta umfari.

### Nýtt lutakast

Fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið verða spældar Kristi Himmalferðardag, sum er tann 25. mai. Bert tann eini dysturin verður spældur, og hann skal avgerast – um neyðugt við longdari leiktíð og brotssparkskapping.

Undanfarin ár hava feløgini vita, hvørjum tey møguliga skulu spæla ímóti í hálvfinaluni, men soleiðis er ikki í ár. Tá ið fjórðingsfinalurnar eru avgreiddar, verður eitt nýtt lutakast um, hvussu tey seinastu fýra feløgini í kappingini skulu hittast.

Finalan verður á ólav søku.

# Formula eigur framvegis bestu deildina

**Formula.fo og Fótbóltssamband Føroya hava longt avtaluna í sambandi við fremstu mansdeildina í fótbólti, soleiðis at Formula.fo heldur fram sum høvuðsstuðul**


FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*

*eydun@sosialurin.fo*


Eina viku undan at landskappingin í fótbólti byrjar, hava FSF og Formula.fo longt stuðulsavtaluna millum partarnar. Avtalan hevur við sær, at besta mansdeildin í fótbólti framhaldandi fer at eita Formuladeildin.

Nýggja avtalan millum FSF og Formula er gjørd eftir sama leisti sum undanfarin ár, og nú er avtalan galdandi í tvey ár.

– Vit fáa eina peningaupphædd frá Formula.fo fyri hesa avtaluna, og meginparturin av teimum pengunum fer beinleiðis út til feløgini, sum spæla í Formuladeildini, sigur Óli Holm, formaður í FSF, sum einki vil siga um, hvør upphæddin er, sum Formula skal gjalda.

### Tvey ár í fasta legu

Afturfyri hesa upphædd fær Formula bestu mandsdeildina í fótbólti kallaða upp eftir sær, og harafturat fær Formula eisini ymsar lýsingarmøguleikar afturfyri í sambandi við dystirnar í deildini.

– Nýggja avtalan byggir á avtaluna frá í fjør, men nú hava vit gjørt eina avtalu fyri tvey ár, og tað leggur hendan partin av fótbóltinu í fasta legu í 2006 og 2007, sigur Óli Holm, sum er fegin um nýggju avtaluna.




*Torkil Holm Petersen, stjóri á Formula.fo, og Óli Holm, formaður í Fótbóltssambandinum, skriva undir nýggju stuðulsavtaluna*

*Mynd: Football.fo*

## Ein Gunnar afturat í GÍ

Tá ið GÍ leygardagin spældi steypadyst ímóti LÍF, vardi ein nýggjur málmaður málið hjá GÍ. Hetta var klaksvíkingurin Gunnar á Steig, sum seinnu árini hevur spælt við EB/Streymi. Gunnar er framvegis í EB/Streymi, men GÍ hevur leigað hann í nakrar vikur, tí loyvið hjá nýggja útlendska málmanninum hjá GÍ er ikki klárt enn. Ein annar Gunnar – Gunnar Nielsen – er eisini komin at spæla við GÍ, men heldur ikki loyvið hjá honum er klárt enn, so hann var ikki við í dystinum ímóti LÍF.

## Andrew skoraði

Dysturin hjá Fremad Amager í donsku 1. deild um vikuskiftið var avlýstur vegna veður, og í staðin spældi liðið hjá Andrew av Fløtum venjingardyst á graslíki ímóti Brønshøj. Dystin vann Fremad Amager 3-0. Andrew av Fløtum, sum spældi allar 90 minuttirnar fyri Fremad Amager, skoraði seinasta málið í dystinum, tá ið hann um brotsteigarmarkið sendi bóltin í málið.

## Coventry tapti stórt

Føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen var ikki við, tá ið Coventry leygardagin tapti stórt í næstbestu ensku deildini. Coventry spældi á útivølli ímóti Crewe, og úrslitið var 4-1 til Crewe. Longu í fyrra hálvleiki hevði Crewe skoraði tríggjar ferðir, og so var Coventry liðugt í tí dystinum. 6.444 fólk sóu Crewe vinna dystin.

## Stórkavi í Start

Meðan Todi Jónsson og liðfelagarnir í Start venja undir sólini í Spania, er leikvøllurin hjá Start í Kristianssand undirkavaður. Ætlanin er, at norska kappingin skal byrja 9. apríl, men tað tykist verða heldur ivasamt, sum verðið er í løtuni. Stórkavi er ymsastaðni í Noregi, og vøllurin hjá Start hevur ligið undir kava í fleiri vikur.

– Tað er ikki vist, at vøllurin verður klárur til fyrsta dystin, men vit gera alt, sum vit kunnu fyri á náa tí, sigur Harald Andersen, dagligur leiðari í Start, við heimasíðuna hjá felagnum.